

# Atlantic Petroleum fingið tvey nýggj loyvi í Norra

**Jan Müller**

21.01.2014 - 20:06

Oljan.fo

Atlantic Petroleum hevur í dag fingið tillutað tvey nýggj loyvi í norska APA 2013 útbjóðingarumfarinum (**A**wards in**P**re-defined**A**reas). Á báðum tillutaðu loyvunum PL 763 og PL 270 B eru leitimið, har kolvetni er staðfest í boringum nærhendis. Møguleiki eru fyri týðandi nøgdum av kolvetni í kortløgdu leitimiðunum.

Eftir tillutingina eigur Atlantic Petroleum lut í 8 loyvum í norskum øki (tvey av hesum eru nýliga keypt og bíða eftir mynduleikagóðkenning). Felagið er við í tveimum leitiboringum í Norra í 2014. Tann fyrra av hesum er Langlitinden, ið verður boraður í løtuni, og hin er Ivory, sum eftir ætlan skal borðast síðst í árinum.

Loyvið PL 763 (teigur6606/2 & 6606/3 (part))liggur í ein útsynning úr Aasta Hansteen leiðini, sum fer í framleiðslu í 2017. Seismiskar 3D kanningar vísa fleiri áhugaverdar møguleikar í loyvinum, og høvuðsleitimiðið hevur sama jarðfrøðisliga leitimodell sum er

ávíst á Aasta Hansteen loyvinum. Atlantic Petroleum eigur 30% í loyvi PL 763. Hini feløgini í loyvisbólkinum eruRepsol (fyristøðufelag) 40% og Rocksource 30%.

PL 270 B (teigur 35/2 & 35/3 (part)) liggur í norðara partinum av Norðsjónum, beint vestanfyri Agat fundið. Seismiskar 3D kanningar eru nýttar fyri at kortleggja møguleikar í loyvinum. Loyvið er latið sum eitt uppískoyti til PL 270, og kemur undir somu arbeiðsætlan. Tíðliga í 2014 verður støða væntandi tikin til, um ein brunnur skal borast á loyvinum, og verður hetta møguliga í 2015. Í hesum loyvinum er ognarluturin hjáAtlantic Petroleum 15%. Hitt felagið í loyvisbólkinum erVNG Norge(fyristøðufelag) 85%.

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum, sigur í viðmerking at hann fegnast um enn eina væleydnaða luttøku í norskum útbjóðingarumfari, og at nýggju loyvini styrkja felagsins støðu í norskum øki, og leggja týðandi møguleikar afturat framtíðar leiting.